# Vár- og summarm

So er várið á gáttini, og við tí skiftir rákið eisini.
Út við tunga vetrarmótanum og inn við nýggjasta vár- og summar-mótanum, sum kemur í handlar-nar í hesum døgum.
Vanliga eru fleiri ymisk rák í senn, og Spring '09 er einki undantak.
Vit hava kann-að, hvørji rák verða at síggja í vár og í summar, og hvussu vit skulu klæða okkum, fyri at vera við

Eydna Skaale
eydnaskaale@hotmail.com

## Jakkar

Jakkan kanst tú ikki vera fyriuttan í vár. Hann skal hava eitt harrakent snið, og vilt tú spara pengar kanst tú altíð leita tær onkran gamlan klædningsjakka hjá sjeikinum ella beiggjanum fram. Vit síggja bæði klædningsjakkan, sonevnda tænara-jakkan og síða cardiganjakkan, sum verða settir saman við øllum frá skrøddum cow-boybuksnum til heildraktir til gamasjur.



*Gucci*



*Stella McCartney*



*Vera Wang*

## Cowboy/indianarar

Hugsa um gamlar cowboyfilmar og fá íblástur haðani.



*Hermes*



*D'squared*



*Paul & Joe*



*Hermes*